## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur i vindi ella hvassur vindur av landsynningi og regn. Um kvøldið nakað minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin ælingur. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin veksur hann vindin av norði og ælingur, týsdagin minkar hann vindin av útnyrðing og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

# Slóðbrótandi skaldskapur á føroyskum

Sjálfstætt fólk - skaldsøgan, ið gjørdi sítt stóra til, at Halldór Laxness fekk nobelheiðurslønina, er nú flutt í føroyskt. Føroyska heitið er: Undir egið borð. Íslendska skaldaverkið, sum verður mett sum eitt tað største skaldaverkið í Norðurlondum, hava Tóra Tóroddsdóttir og Martin Næs týtt til føroyskt.

Bókin er týdd til nógv mál og er komin út víða um í heiminum, m.a. er hon seld í fleiri hundrað túsund eintøkum í USA. Hon elvdi til hart stjórnmálakjak í Íslandi, tá ið hon kom út í 1934-5, og í dag er hon ein tann største mentanardýrgripurin, ið íslendingar eiga. Kanska ein tann største skaldsøgan, ið nakrantíð er komin út í Norðurlondum.

Høvuðspersónurin er ein bóndi uppi á Norður-Eysturlandinum, Bjartur í Ljósagerði, ein ágrýtin, treiskur og støðufastur maður, ið ikki bakkar ein tumma fyri nøkrum, hvørki fyri yvirvaldinum ella teimum hægru maktunum, í stríðnum fyri sjálvræði og frælsi.

Søgan um Bjart bónda er skemtingarsom og tregafull. Fyrst og fremst er hon tó eitt málsligt meistaraverk um sambandið millum dreymin, veruleikan, náttúruna og menniskjað. Eitt skaldsligt tónaverk úr enda í annan.

Hóast hendingarnar fara fram í fyrru helvt av seinastu øld, er søgan um Bjart ongantíð so viðkomandi sum júst í dag, kanska serliga viðkomandi um okkara leiðir, nú vit eru komin inn í eina nýggja øld, har virði, samleiki og persónmenska verða fyri støðugum árinum bæði innanífrá og uttan úr heimi.

Bókin verður í bókabúðunum fríggjadagin 12. oktober

**Rd.**




*Undir egið borð er skaldsøgan, ið gjørdi sítt stóra til, at Halldór Laxness fekk nobelheiðurslønina. Eitt skaldsligt tónaverk úr enda í annan – nú á føroyskum.*

*Undir egið borð*
Halldór Laxness
Skaldsøga
Týtt hava Tóra Tóroddsdóttir og Martin Næs
Forlagið Sprotin
436 blaðsíður
Bókin er innbundin og kostar 340 kr

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 7 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 21 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 26 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 18 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 27 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 20 |
| New York | 18 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | -- |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 995 hPa. millum Íslands og Føroya fer skjótt eystureftir.




**Í dag:**
Djúpa lágtrýstið vestan fyri Ísland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/10 kl. $06^{00}$ – 10/10. $06^{00}$. Hitin í gjár: 5,3°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 09/10 kl. $06^{00}$– 10/10 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í oktober: 25,0 mm

**Tiltøk í Miðlahúsinum**

**16. oktober kl. 20**
*Føroya Væl*

**Mikudagin 17 oktober kl. 16**
*Bragdið 50 ár*

**Mikudagin 17. Oktober kl. 19.30**
*Psykoterapiútbúgving*

**24. oktober**
*Demokratia*

**25. oktober**
*Føroyskt Lógarrit*

FØROYABANKI
*stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum*

Lesið Sosialin -tað loysir seg

## VESTFALLSKYRRINDI

11. oktober Tendring
13. oktober Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 . okt. | 07.22 | 19.41 | 06.22 | 18.41 | 06.37 | 18.56 | 09.22 | 21.41 | 10.22 | 22.41 | 05.37 | 17.56 |
| 12 . okt. | 08.02 | 20.23 | 07.02 | 19.23 | 07.17 | 19.38 | 10.02 | 22.23 | 11.02 | 23.23 | 06.17 | 18.38 |
| 13 . okt. | 08.45 | 21.07 | 07.45 | 20.07 | 08.00 | 20.22 | 10.45 | 23.07 | 11.45 | - | 07.00 | 19.22 |
| 14 . okt. | 09.27 | 21.48 | 08.27 | 20.48 | 08.42 | 21.03 | 11.27 | 23.48 | 00.07 | 12.27 | 07.42 | 20.03 |
| 15 . okt. | 10.10 | 22.33 | 09.10 | 21.33 | 09.25 | 21.48 | - | 12.10 | 00.48 | 13.10 | 08.25 | 20.48 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 . okt. | 04.37 | 16.56 | 07.37 | 19.56 | 08.37 | 20.56 | 07.07 | 19.26 | 08.22 | 20.41 |
| 12 . okt. | 05.17 | 17.38 | 08.17 | 20.38 | 09.17 | 21.38 | 07.47 | 20.08 | 09.02 | 21.23 |
| 13 . okt. | 06.00 | 18.22 | 09.00 | 21.22 | 10.00 | 22.22 | 08.30 | 20.52 | 09.45 | 22.07 |
| 14 . okt. | 06.42 | 19.03 | 09.42 | 22.03 | 10.42 | 23.03 | 09.12 | 21.33 | 10.27 | 22.48 |
| 15 . okt. | 07.25 | 19.48 | 10.25 | 22.48 | 11.25 | 23.48 | 09.55 | 22.18 | 11.10 | 23.33 |